

# Føroysku tónleikararnir áttu Summarfestivalin

**Ein fantastiskt samanrenning av framúrskarandi føroyskum tónleiki lyfti Summar Festivalin á eitt støði, sum hann neyvan hevur verið á áðrenn. Føroysku tónleikararnir áttu festivalin, meðan tey útlendsku nøvnini, hóast góð, tóktist mest verða upphiting til tey veruligu høvuðsnøvnini**

HUGLEIÐING
*Barbara Holm*
*barbara@sosialurin.fo*

Hóast eg sannlíkt eri ein tann størsti elskarin av føroyskum tónleiki her á landi, so verið eg framvegis ovfarin av stóra hópinum av fantastiskum tónleikarum, sum vit eiga her í Føroyum.

Hvørt tað var væl samansetta skráin, ella stemningurin í Klaksvík sum gjørdi munin, veit eg ikki, men í øllum førum vóru øll trý kvøldini á Summar Festivalinum merkt av tí ovurstóra kærleika, sum føroyingar hava til føroyskan tónleik. Við Dynamit, Frændum, Páll Finni Páll, Anfinn og Co., Sámal Ravnsfjall, Tróndi Enni, Faroe5 og einari ørgrynnu av øðrum tónleikarum, var hetta avgjørt besti parturin á skránni hjá Summar Festivalinum, og eisini konsertirnar, sum festivalgestir nir fegnaðust mest um.

Hóast Nik & Jay og ABBA høvdu góðar framførslur, og megnaðu at fylla Vágsbø, so var tað kortini eingin ivi um, at føroyski tónleikararnir veittu tað berandi undirhaldið í Klaksvík.

Túsundtals festivalgestir skríggjaðu við til "Viiiit vilja onnngantíð doyggja" – "Eg vil liiiiiva" og " Lat hana faaara avstaaað" og eini ørgrynnu av øðrum fantastiskur føroyskum løgum..

So mín niðurstøða er uttan iva, at eingin festivalur í Føroyum hevði verið til, um tað ikki var fyri føroyska tónleikin.

### Trupult at velja

Við stóra hópinum av góðum tónleikarum, tóktist kanska mest sum, at fyriskipararnir av SF høvdu trupult við at lata allir bólkar koma til sín rætt. Skal ein finnast at skránni kann sigast, at Frændur, ið framførdu kl. 19.15. leygarkvøldið, fóru nakrir tímar ov tíðliga á pall. Fólkakæru Frændur høvdu komið betri til sín rætt nakrar tímar seinni. Tó skal sigast, at teirra framførsla var framúr, og allir teir túsundtals festivalgestirnir fagnaðu teimum á teirra 25 ára hátíðarhaldi.

Seinnu tíðina hevur eitt kjak tikið seg upp um, hvørt Páll Finnur Páll kunnu metast at vera teir "nýggju" Frændur ella ikki. Leygarkvøldið prógvaðu teir í øllum førum, at føroyingar í øllum aldursbólkum streyma til teirra framførslur, og allarhelst var størsta mistakið hjá Summar Festival fyrireikarunum, at Páll Finnur Páll framførdu í Flagstjaldinum heldur enn á Stóra palli. Tá ið Páll Finnur Páll trinu á pall stutt eftir midnátt leygarkvøldið, vóru so nógv fólk savnaði í tjaldinum, at fleiri hundrað ella túsund fólk stóðu uttanfyri og sungu við, tí tað var ikki rúm fyri teimum í tjaldinum. Eftir hesum at døma má staðfestast, at Páll Finnur Páll avgjørt høvdu megnað at fylt Vágsbø av Stóra Palli.

### Alt koyrdi bara

Við øllum festivalunum, sum hava verið í summar, má Summar Festivalurin sigast at verða tann, ið tykist mest professionellur. Ein fekk eina kenslu av, at hetta ikki bert var frítíðarítriv hjá festivalfyrireikarunum, men kanska heldur størsti partur av teirra lívið. Um ikki, so duga fyrireikararnir í øllum førum væl at skipa fyri festivalum, og kanska heldur ikki so óvæntað, tí Summar Festivalurin hevur verið afturvendandi nú í seks ár, við somu fyrireikarum alla tíðina.

Sum skilst er samstarvið millum tónleikararnir og fyrireikararnir eisini professionelt, tí longu áðrenn festivalurin fór av bakkastokki, høvdu allir tónleikararnir móttikið teirra løn. Og hóast tað kann tykjast, sum fyrireikararnir av Summar Festivalinum hava lært nakað frá fyrireikarunum av festivalinum við Múrin, so er kortini ikki so. Seinastu tvey árini hava tónleikarar móttikið løn áðrenn festivalin, so hetta er ikki íkomið í ár. Heldur kann sigast, at tað neyvan er fyrr enn í ár, at týdningurin av løn áðrenn framførslu kann virðismetast til fulnar.

Gjøgnum allar festivaldagarnir fekk ein eina kenslu av, at hvørt nik og prik á festivalinum ella kanska í allari Klaksvíkini var lagt væl til rættis. Til dømis kann nevnast, at Føroya Tele, sum heldurt til inni á sjálvum festivaløkinum, bjóðaðu festivalgestunum at løða fartelefonina ókeypis. Eitt smáting kanska, men kortini kendist tað sum, at alt var so mikið væl fyriskipað, at eingin festivalgestur skuldi merkja nakran trupulleika á festivalinum – ikki eingongd at hava eina útbrenda telefon.

Eitt annað, sum takast kann burtur úr mongdini er, at gekk ein frá Stóra Palli til Flagstjaldið, var tónleikur at hoyra allan vegin. Frá øllum sølubásunum frá Stóra Palli til Flagstjaldið, rungaði tónleikur út til fjøldina. Í góðveðrinum í Klaksvík, kendist tað sum at vera á ólavsøku at spáka sær runt á festivaløkinum, og serstakliga, tá ið teir ymisku básarnir høvdu alt frá festivalbúffum til øl og pitsa at bjóða gestunum, sum sanniliga eisini tóku sær stundir at steðga á við teir ymsu básarnir.

### Summar Festivalurin 09 – framúrskarandi

Ja, so einfalt kann tað sigast. Fyrireikarar, tónleikarar, starvsfólk, klaksvíkingar og allir festivalgestirnir eiga saman æruna av, at Summar Festivalurin var so fantastiskur, sum hann var. – Og so gjørdi góðveðrið eisini sítt til, at Summar Festivalurin bjóðaði eitt magiskt vikuskiftið.

